LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingartreytir fyri ókeypis lýsingar:
Privatar lýsingar í mesta lagi 40 orð, bert ein lutur í hvørjari lýsing, hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Frá fyritøkum og virkjum.
Lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur«
Bill. merktar.

Minsta gjald fyri lýsingar:
70 kr. við MVG hvørja ferð.

Akfør

NISSAN ECO-T 100 TIL SØLU
lastbilur árg. 97 við vippulast og krana, skal sýnast. Prísuppskot kr. 45.000
225101

C5 2.2 AUTO GEAR
árg 2001 koyrt 169000 km luksus modeli, bíligari bilur kann ganga inn í keypi.
288855

EIN SKODA OCTAVIA 1.9 TDI TIL SØLU
Ein sera kvikur og økonomiskur bilur, uml. 20 km/l. Hevur m.a. el-rútar, el-spegl, tráðleyst sentrallás og infocentur. Árg. febr. 2003. Km. 156.000. Prísur: 85.000 kr. Annar dieselbilur kann møguliga takast í býti. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 598136

TOYOTA COROLLA
Frá 1995 við skaða, bíliga til sølu.
Tlf. 262087 ella 448400

RENAULT TIL SØLU
Model Twingo, TYPA 06 Fire 8000 kr.
Tlf. 508878

KELBERG DUMPARALAST
Til sølu.
Tlf. 221759

PNG MASKINVOGNUR
Til sølu.
Tlf. 221759

SCANIA-TREKKARI
Scania 143 M, árg. 91, til sølu.
Tlf. 221759

GER KVETTI
Citroen Berlingo 1.6 dielsel, 90 HK, árg. sept. 2006. Koyrt 50.000 km. Hevur elrútar framman, hita í setrum framman, sentrallás, elspegl og AC. Bilurin er sera rúmligur og orkusparandi, tekur 60 litrar og koyrir uml 900-1000 km uppá tangan. Eyka kavadekk á felgum fylgja við. Prísur: 119.000 kr.
Tlf. 503838

Alt til akfør

TIL SØLU
4 sportfelgur til Hyundai Sonata + 2 góð kavadekk - prísur 6.000 kr.
Tlf. 584394

4 LÍTIÐ BRÚKT PÍKADEKK
av slagnum Goodyear Ultra Grip 500 195/65-R15 á alu felgum (Viper by Rial), 5 hol, passa t.d. til Skoda Octavia 1,6,til sølu fyri 4000 kr.
Tlf. 447389/269389

GÒÐ SUMMARDEKK
Á felgum 155/70-13, passa til Nissan Micra.
Tlf. 314957
ella 262970

Amboð

EL-BLANDIMASKINA
til 1/2 sekk ynskist til keyps.
Tlf. 212128

Arbeiði

FRÍÐKAN
Søkt verður eftir dagligum leiðara til Fríðan í Miðlon. Tú fært ábyrgd av salongini og kemur at tilrættisleggja dagliga arbeiði og marknaðarføra Hárfríðkuna Salong. Tú skal eisini syrgja fyri at salongin altíð er við tí seinasta. Umsóknir skulu sendast til: Salong Fríðkan, Postboks 1047, 110 Tórshavn
Salong Liljan

NÆMINGUR SØKIR
Eftir modellum til klipping - harrar og damir. Kostnaður 100 kr.
Tlf. Salong Liljan

Barnaútgerð

EMMALJUNGA HJÓL
4stk lufthjól til Emmaljunga duo edge combi ella koyristólarnar hjá Emmaljunga, sum nýggj gil sølu fyri 500 kr.
274472

EMMALJUNGA ALLROUND KOYRIPOSI
óbrúktur nýggjur svartur koyriposi frá Emmaljunga nýprísur 625 kr. til sølu fyri einans 300 kr.
ring/sms 274472

BÍLIGUR TRILLE GIGANT
Góður og vælhild barnavognur, bert brúktur til eitt barn. Svartur við lufthjólum. 1500 kr.
ring/sms 274472

Bátaútgerð

MARNA BÁTAMOTOR
18 HK, 1800 omdr, frá 1071, lítið brúktir við øllum tilhoyri til sølu. Ring og hoyr nærri. Ring
Tlf. 218130

GER KVETTI
Bátur, 32 føtur, alminium, 80 HK Ford Feapower, undir umbygging, sera bíliga til sølu
Tlf. 723177

Bingo

GOTT BINGO
verður í Framtíðini onskvøldið 1. okt. kl. 19. Nógvir góðir vinningar m.a. lamb á lutaseðli. Drigið verður millum spølini.
KFUM-Skótarnir

BINGO VERÐUR
í Tvøroyrar klubba tórskvøldið 4. okt. kl. 19. Bæði eykaspøl enda.
Tvøroyrar Klubbi

FRÁ TÓRSHØLL
Gott bingo verður leygardagin 4. okt. kl. 19. Høvuðsvinningur fø. ræst krov og nógv annað gott. Eisini vera eykaspølini. Øll vælkomin.
Tórshøll

BINGO
verður í Pálsstovu sunnudagin 5.10.08 kl. 16. full pláta 500 kr. Á lutaseðli m.a. 3 røst føroysk krov í heyst.
Kiwanisfelagið Rósan

BINGO
Hesa vikuna verður í Felagslonini í Fuglafirði hóskvøldið 2. oktober kl. 19.30. Drekkamuður fæst í steðginum. Vit hava bingo annanhvønn leygardag og annaðhvørt hóskvøld. Øll eru vælkomin.
Eldrafelagið Borgin

BIGO
Bingo verður í Pállstovu hósdagin 2. oktober, klokkan 1900. Full pláta 500 kr. Á lutaseðlinum døgurðamatur, gávukort og ein flogferð. Bingola og eyka eyka verður. Øll eru hjartaliga vælkomin
Kyndil

Burturm. /funnið

BURBERRYJAKKI BURTURMISTUR
Eg havi tíverri mist mín svarta burberryjakka burtur her fyri. Eg hoyri, at lýsingar hava verið um hann, men finni tær ikki aftur. Kennir tú til hendan jakkan, vinaliga ring til mín á
599045

FARTELEFON BURTURMIST
silvurlitt Nokia 2760 í etui, burturmist í Gundadali, kanska í Badmintonhøllini ella Gundadalshøllini, 18/9.
Tlf. 224233/591559

Býli í Føroyum

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Uml. 45 fermetrar. Køkur/stova í einum, kamar og baðiverilsi kr. 4.500,- mðr. við el og varma. Verður leiga út til ein persón.
Tlf. 313339 ella 279993

KAMAR Í TÓRSHAVN
Kamar til leigu til friðarligt fólk. Liggur skamt frá handilsskúlanum. Felags køk, bað, vaskimaskinu og frystiboks.Møguleiki fyri breiðbandi.
Telefon: 280505

HÚS YNSKJAST TIL LEIÐU
Hjún við 2 børnum søkja hús í Hoyvík ella í Havn skjótast gjørligt, fara væl um og gjalda til tíðuna.
Ring 321507 ella 580940

FRÍTÍÐ Í SANDAVÁGI
Hugnalig hús til leigu í styttri tíðarskeið, standa væl fyri best egnaði til 2 pers.
Tlf. 283450-333450

ÍBÚÐ YNSKIST
í Havn, Hoyvík ella Argjum til leigu, eri 29 ára gomul og havi fast starv.
Tlf. 755886

KANST TÚ HJÁLPA OKKUM?
par við einum barn, sum er í ferð við at flyta til Føroyar aftur og hava einki at búgva í frá 1 des. skal verða í Tórshavn, Argjum ella Hoyvík, max. 5500 kr. við ljós og hita.
Tlf. 250575-252040

GOYMSLUHØLI Í TÓRSHAVN
85 m2 til leigu.
Tlf. 224910

SOS
Einlig mamma søkir okkurt at búgva í sum skjótast. Alt hevur áhuga.
Tlf. 593120

HJÁLP
Par við 2 børnum søkja íbúð í Havn skjótast gjørligt, skal hava 2 kømur max. 5000 kr. um mðn. fara væl um og gjalda til tíðuna.
Tlf. 580840

GÓÐ ÍBÚÐ Í SYÐRUGØTU TIL LEIGU
Nærri við at venda sær til
Tlf 316687 ella 216686

KAMAR YNSKIST
Er tað nakar, ið hevur eitt kamar til leigu fyri 2000 kr. um mán. ella minni. Tað verður bara fyri fríggja-, leygar-, sunnudag og til mánamorgun.
tlf. 263274

Býli uttanlands

HÚS TIL LEIGU NORÐANFYRI AALBORG
200kvm, totalt nýumvælt, kann vera við innbúgvi, sentralt, 4 kømur, nýggj baðirúm, køkur o.a. Leiga 4.400,- um mánaðin,
Kontaktinfo. nikarp68@yahoo.dk

Dýr

2 VEÐRAR
veturgamlir 55-65 pund til sølu fyri hægstbjóðandi.
Tlf. 226817

KANINBÚR YNSKIST
Er tað nakar, sum eigur eitt kaninbúr at selja mær? Búrið skal allarhelst síggja pent út og vera væl hildið. Skal nýtast innandura. Ring vinarliga á
tlf. 508155

DÝR
4 mðr. gamal kettlingur verður latin djóravini.
Tlf. 587254

KANIN BÚR
gott brúkt kanin útibúður ynskist.
Tlf. 316769-213535

GEITIR
til sølu.
Tlf. 218155

FITTUR KETTLINGUR
Vit sóknast eftir góðum og kerligum heimi til sera fittan kettling.
Tlf. 504533, Djóraverndarfelagið

NÝTT HEIM SØKIST
til ein vaksnan geldan frens, er mest svartur, hevur hvítt trýn og hvítar labbar, sera góðsligur og róligur.
Djóraverndarfelagið, tlf. 504533

HUNDAHVØLP VERÐUR LATIN DJÓRAVINI
9 vikur gamal, fæst við at avheinta hann.
Tlf. 449288-229288

KÁLVUR SØLU
selist vegna flyting til DK at búgva. Um tit halda, tit vilja geva honum eitt gott og kjerlig heim, so ring á
telefon 581548

HVØR VIL EIGA MEG
sera barnavinarlig, 3 ára gomul Golden Retriver tík, verður latin djóravini.
591152

SAKNAR NAKAR EIN KETTLING
svartur kettlingur við hvítum labbum og hvítum sprøklum um snýði er komin at vitja í SMS, tí hann ikki finnur heim. Eigarin kan heinta hann í Matas í SMS.
Tlf. 314888

PUDDELBLANDING
verdur latin djoravini.
Tlf. 264201

SKOVKETTA
frensur undan skovkettu verður lætin djoravini.
Tlf. 264201

3 SKJALDBØKUR
Við 250 litrars akvarium, hitalikam og reinsipumpu og alt annað tilhoyr fylgir við, bíliga til sølu.
Tlf. 594728

CHIHUAHUA HVØLPUR
4 mðr. gamal chihuahua hvølpur (tík) til sølu, myrka- og ljósabrún, hevur stamtalvu.
Tlf. 503510 ella 232488

Fartelefonir

EIN SONY ERICSSON 5500I TIL SØLU
Litur: Gull/gul, 1 ára gomul, til sølu fyri 1000 kr.
Tlf. 583725

Fundir

ÁÐURNEVNDI AÐALFUNDUR
Hjá Kurvaböltsfelagnum hamar er útsettur til 18. oktober 2008.

Húsarhaldstól

ZANUSSI VASKIMASKINA
2 ára gomul Zanussi AquaCycle 1400 vaskimaskina, til sølu fyri 1000 kr. nýprísur uml. 4000 kr.
507001

Innbúgv

MØBLAR TIL SØLU
1 marmorstovuborð, 2 leðurstólar og lampa bíliga til sølu.
Tlf. 226817

BORÐ YNSKIST
1.20 m.
Tlf. 513293

HVÍTUR BONKUR YNSKIST
hevur tú ein hvítan bonk ikki breiddri enn 1,20 m. til sølu.
Ring 313293

MØBLAR TIL SØLU
Flott hornasofa, ljóstbrún 3000 kr., glas sofaborð 600 kr., glas sjónvarpborð 400 kr., el ovnur við 2 plátum 600 kr., borð til 8 pers. við 4 stólum 1000 kr. Alt selist vegna plásstrot.
Ring 580298 Tummas

INNBÚGV TIL SØLU VEGNA FLYTING
borð við stólum 1000 kr. 2 og 3 mans sofur fyri 3500 kr.
Tlf. 220649

Lýsingartekstur

_____

_____

_____

_____

_____

_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Alt til akfør	❑ Amboð
❑ Arbeiði	❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð
❑ Bátaútgerð	❑ Bingo	❑ Brævaskifti
❑ Burturm./funnið	❑ Býli	❑ Býli uttanlands
❑ Bøkur	❑ Dansur	❑ Dýr
❑ Fartelefonir	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súkklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl 12.00 dagin fyri útgávudagin, t.v.s. at lýsingin til mánadagsblaðið skal vera okkum í hendi fríggjadag á middegi.
Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.
Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki